Miðflokkurin:

# Avtalan liðug

**– Tá ið Lisbeth og Jóannes eru farin til samráðingar við Fólkaflokkin uttan at siga okkum frá, so er avtalan millum okkum liðug, sigur Jenis av Rana, sum eisini hevur boðað løgmanni frá hesum**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Jenis av Rana er ikki nøgdur við, at Jóannes Eidesgaard og Lisbeth L. Petersen og teirra flokkar halda fundir við Fólkaflokkin.

– Tá ið Lisbeth og Jóannes eru farin til samráðingar við Fólkaflokkin uttan at siga okkum frá, so er avtalan millum okkum liðug. Vit meta ikki, at vit kunnu kalla okkum bólk longur, sigur Jenis av Rana.

Jenis av Rana hevur boðað løgmanni frá hesari støðuni hjá flokkinum. Hann hevur gjørt hetta, tí løgmaður, Anfinn Kallsberg, áður hevur sagt, at teir ikki vistu seg vissar í, hvørt Miðflokkurin enn var partur av andstøðuavtaluni.

Jenis av Rana heldur, at hinar báðir partarnir í avtaluni, Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin, hava gjørt avtaluna til eina vittigheit.

– Vit vilja nýta sama frælsið, sum hinir báðir flokkarnir hava gjørt, sigur Jenis av Rana.

Hann sigur tó, at fer løgmaður niðan í tingið við 16-16, so stendur andstøðan enn saman.

Í skrivandi stund verður dúgliga ferðast millum hølini á Gamla Apoteki. Fundirnir verða framvegis kallaðir óformellir. Anfinn Kallsberg hevur ikki boðað frá øðrum enn, at hann heldur fram við sekstan tingmonnum í sínum parti.

### Enn galdandi

Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, sigur við Sosialin, at hann ikki heldur nakra avtalu vera brotna fyri tí, at teir hava hildið nakrar óformellar fundir við Fólkaflokkin. Hann sigur seg bara kunna staðfesta, at støðan er fastlæst sum er.

Hann sigur, at andstøðan hevur eina avtalu, ið tryggjar, at teir tríggir flokkarnir, Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Miðflokkurin, standa saman, um samgongan fer niðan í tingið við støðuni 16-16. Hetta kann so væl enda við, at lutakast verður um tingformanssessin og kanska eisini formanssessir í løgtingsnevndunum.

– Vit kravdu eina formansrundu, men løgmaður stendur við sítt. Hetta kunnu vit bara staðfesta. Avtalan er framvegis galdandi, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann sigur, at hann ætlar at fara at tosa við Lisbeth L. Petersen, forkvinnu í Sambandsflokkinum, um hvat hendir við avtaluni teirra millum.



*—Tá ið Lisbeth og Jóannes eru farin til samráðingar við Fólkaflokkin uttan at siga okkum frá, so er avtalan millum okkum liðug. Vit meta ikki, at vit kunnu kalla okkum bólk longur, sigur Jenis av Rana*

## Elin koyrd úr øllum nevndum

**Elin Lindenskov er koyrd úr øllum nevndum hjá Tórshavnar býráð. Hon er nú "bara" vanligur býráðslimur, men tað er ikki við hennara góða vilja**

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ
*Heri á Rógvi*

Sum úrslit av avgerðini hjá Tórfinn Smith, so er Elin Lindenskov sett uttan fyri allar býráðsnevndir. Støðan í Tórshavnar býráð er broytt nakað, síðani Tórfinn Smith gjørdi av at siga minnilutanum farvæl og fara upp í meirilutan við Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum.

Ein fylgja av hesum er, at Elin Lindenskov ikki er nevndarlimur í nakrari av nevndum býráðsins.

Undan eykabýráðsfundinum mikukvøldið var hon limur í sosialu nevnd, heilsu- og umhvørvisnevndini og Fíggjarnevndini.

Hesar nevndarsessir hevur tó mist nú.

– Tað er úrslitið av tí, ið Tórfinn Smith hevur gjørt. Býtið verður soleiðis, at eg ongar nevndarsessir fái, men hetta er so avgjørt ikki nakað, ið eg eri glað fyri, sigur Elin Lindenskov.

Minnilutin misti sjey nevndarsessir við nýggju støðuni. Tórfinn Smith vann sær tveir nevndarsessir, og hetta ger, at Elin Lindenskov ongan nevndarsess fær.

Minnilutin hevur sjey nevndarsessir at ráða yvir, og hesir eru allir mannaðir av tjóðveldisumboðum, sum ikki vilja ganga við til, at Elin Lindenskov fær ein nevndarsess, tí Tórfinn Smith eigur fleiri nevndarsessir.

– Hetta ger støðuna ógvuliga trupla, og eg verði so noydd til at halda meg fram at sum býráðslimur, men tað verður strævið, sigur Elin Lindenskov.

Hon undirstrikar, at minnilutin kennir seg sviknan av Tórfinni Smith.

– Tað undrar meg, at Tórfinn Smith er farin upp í eina borgarliga samgongu, uttan at broyta samgonguskjalið, sigur Elin Lindenskov.

Elin Lindenskov sigur seg sakna floksdisiplin, ið hon sjálv leggur stóran dent á.

Málið viðvíkjandi Tórfinn Smith er ikki liðugt avgreitt í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, har málið liggur í løtuni.

Elsba Olsen, forkvinna, sigur, at tey hava boðað Elini Lindenskov og Tórfinni Smith frá, at tað er Elin, ið umboðar Javnaðarflokkin í býráðnum.

Elsba Olsen sigur seg ikki kunna siga meira um málið sum støðan er.

# Nýggj støða í Tórshavnar býráð

**Tórshavnar býráð hevur nú mannað tær sjey nevndirnar av nýggjum við býtinum fýra til meirilutan og ein til minnilutan. Elin Lindenskov hevur nú ongan nevndarsess**

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ
*Heri á Rógvi*

Tórshavn: Tórshavnar býráð hevði mikukvøldið eyka býráðsfund. Bert eitt punkt var á skránni: At velja umboðini til tær sjey nevndirnar av nýggjum. Støðan gjørdist tann, at Tórfinn Smith úr Javnaðarflokkinum tók seg burturúr minnilutanum og fór upp í meirilutan við Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum.

Hann segði í samrøðu við Sosialin, at orsøkin til hetta stigið var, at hann kendi tað sum um, at hann lítla og onga ávirkan hevði sum andstøðulimur, og hann vildi, at veljararnir skuldu kunnu fáa ávirkan gjøgnum sítt umboð. Hetta riggaði best í meirilutanum, ið hann uttan stórvegis hóvasták kundi fara undir at samstarva við.

Fundurin gekk stillisliga fyri seg og endaði eftir at nýggju nevndirnar vóru mannaðar. Borgarstjórin, Jan Christiansen, gjørdi vart við, at hetta var fyrstu ferð, ið hann mintist, at ein býráðslimur ongan nevndarsess hevði. Hann tosaði tá um Elina Lindenskov, ið ikki fekk tillutaðan nakran nevndarsess.



*Jan Christiansen hevur fingið ein afturat í sín part í Tórshavnar býráð. Tórfinn Smith fær við sínum nýggja leikluti tveir nevndarsessir afturat. Harav ein formanssess.*

*Mynd: Finnur Justinussen*

### Harmast um tapið

Minnilutin í Tórshavnar býráð harmaðist á býráðsfundinum mikukvøldið um, at Tórfinn Smith var farin í part við meirilutanum

Leivur Hansen tók vegna minnilutan, t.e. Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin, orðið á býráðsfundinum.

Hann segði, at teir í minnilutanum harmaðust um, at Tórfinn Smith var farin úr minnilutanum og upp í meirilutan.

— Vit harmast um, at Tórfinn Smith hevur valt at sagt okkum farvæl. Tað er eisini soleiðis tað skal skiljast, at hann hevur sagt okkum farvæl. Vit meta, at minnilutin hevur megnað at fingið gjørt okkara ávirkan galdandi – serliga í sambandi við fíggjarætlanini, segði Leivur Hansen á býráðsfundinum mikukvøldið.

Hann segði seg vera serliga harman um, at minnilutin misti nevndarsessir.

Við nýggju støðuni eigur meirilutin fýra av fimm teimum fimm nevndarlimunum í teimum sjey nevndunum.

Arbeiðið hjá Tórshavnar býráð heldur nú fram við nýggja býtinum í nevndunum.

Yvirlitið yvir nevndirnar kann síggja á www.torshavn.fo



# Halda 110 ára føðingardag

**Mánadagin fyllir elsta bóltfelag í landinum runt og tað verður hátíðarhildið við ymsum tiltøkum**

FØÐINGARDAGUR
*Áki Bertholdsen*

Mánadagin verður elsta bóltfelag í landinum 110 ár.

Tað er sjálvsagt TB, Tvøroyrar Bóltfelag, sum talan er um. Aldursforsetin í føroyskum bóltleiki varð settur á stovn 13. mai í 1892 og føðingardagurin mánadagin verður hátíðarhildin við ymsum tiltøkum, men tey verða øll í dag og i morgin.

Jens Johannesen, sum er ein av fyrireikarunum, sigur, at tað eru TB, og ein annar, gamal stovnur í bygdarmyndini á Tvøroyri, Klubbin, sum skipa fyri ymsum tiltøkum í felag.

Klokkan átta í kvøld verður kvøldseta í Klubbanum. Har verður okkurt til matna, sungið verður úr TB sangbókini og ymiskt annað, lokalt verðurá skránni. Eitt nú fara gamlir spælarar at fortelja frá ymsum hendingum í fótbóltslívi teirra. Teir, sum siga frá, verða Hans Pauli Holm, Delmar Joensen, Petur Hammer, Dan Nielsen og Arne Petersen.

Aftaná verður dansur í Klubbanum, har íð plátuvendarar frá tí gamla Tvøroyrar Disklubba, sum var fastur táttur í náttarlívinum á Tvøroyri fyrst í sjeytiárunum, verða við og teir fara at spæla plátur frá seksti- og sjeytiárumum.

Hesin dansurin verður fyri tey meiri tilkomnu og prísurin fyri alt tiltakið í klubbanum er 80 krónur

Men tey ungu eru ikki gloymd, tí í TB húsimum verður dansur fyri tey ungu, har ið "Ein blanding" fer at spæla.

Men tað verður eisini fótbóltur á skránni.

Klokkan eitt sunnudagin fara dreingjaliðini hjá TB og VB at sparka og aftaná hittast piltaliðini hjá somu feløgum. Og klokkan trý tørna 1. deildarliðið hjá TB og 2. deildarliðið hjá Sumba, saman.

Allir dystirnir eru steypadystir.

Í hálvleikinum fáa áskoðararnir kaku og kaffi, og børnini Sun Kist í TB- húsinum.



*Hetta vikuskiftið verður kvøldseta, dansur og fótbóltur fyri at hátíðarhalda 110 ára føðingardagin hjá elsta bóltfelagi í landinum*

### Seks meistaraheiti

Spælararnir, sum fara at minnast gamlar dagar í klubbanum leygarkvøldið, hava óivað nógv at siga frá, tí hesi árini hevur tað bæði gingið upp og niður hjá TB. Gyltu árini hjá TB voru í sjeytiárunum og áttatiárunum, tá ið liðið var Føroyameistari og steypavinnari fleiri ferðir. Tilsamans hevur TB verið føroyameistari seks ferðir, í 1943, 1951, 1976, 1977, 1980 og í 1987.

Fimm ferðir hevur liðið vunnið føroyska steypakappingina, í 1956, 1958, 1960, 1961 og í 1977, tá ið teir sostatt vunnu greipuna.

Men hesi seinastu árini hava verið meiri soltin, tí í fleiri tíðarskeið hevur liðið verið í 2. deild, men í fjør vunnu teir sær aftur rættin at spæla í bestu deildini.

# Felagstiltak hjá Kommunualu Ansingarskipanini í Klaksvík

**Seinastu vikuna hava øll børnini í kommunalu ansingarskipanini í Klaksvík arbeitt saman um eitt evni. Evnið hesu ferð var Fjøra, og í sama sambandi varð eisini skipað fyri fyrilestri, felags tónleikaløtu og framsýning**

ANSINGARSKIPAN
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Endamálið við felagstiltakinum var millum annað at menna og virðismeta skapandi evnini hjá børnunum, at arbeiða við einum felags evni á ymiskan hátt og at onnur fáa innlit í, hvat arbeitt verður við í kommunalu ansingarskipanini.

Ein arbeiðsbólkur fyri dagrøktina og ymsu barnagarðarnir í Klaksvík hevur samskipað tiltakið, og vóru eini 500 børn við í felags verkætlanini.



*Millum alt hitt á framsýningini funnu vit eisini eina útgávu av viðarlundini úti í Grøv. Hesa høvdu børnini sjálv framleitt, tó í minni útgávu enn tann upprunaliga*

### Fjøra

Øll ansingarplássini skuldu arbeiða út frá evninum Fjøra. Arbeiðið skuldi verða gjørt útfrá, hvat hvørt einstakt ansingarpláss hevði hug til.

Verkætlanin bar nógvar fjøruvitjanir við sær, og børnini fingið kunning um fuglar, fiskar og alt tað, ið ein annars kemur fram á í fjøruni.

Síðan hava tey arbeitt víðari við hesum, tá tey eru komin heimaftur, og úrslitið av hesum arbeiðið vístu tey fram á eini framsýning í Lognbrá.

Inni í Lognbrá hevði hvørt ansingarpláss sítt stað, har fólk kundu síggja, hvat júst hesi børnini høvdu fingið burturúr.

Og mangt var at síggja. Allastaðni í hølinum var fiskanet hongt upp, og á hesum neti hingu fiskar, krabbar, sjóstjørnur, gággur og annað.

Eisini høvdu børnini framleitt ymiskt afturat, sum síðan varð stillað fram á borðum runt í hølinum.

### Tónleikur og fyrilestur

Fyrst í vikuni varð eisini skipað fyri eini felags sang- og tónleikaløtu fyri børnunum í Mentunnarhúsinum Atlantis.

Navnframi Karl Martin Samuelsensang fyri, og væl gekst at fáa børnini við í sangin.

Umframt sangir, sum tey øll kenna, vóru eisini ymsir sangir um fjøruna og havið.

Eftir sangløtuna varð ein fyrilestur á skránni fyri øll tey, ið hava børn í ansing.

Steinbjørn Jacobsen:

## – Útjaðarin avskorin frá landinum

**Í Norðlýsinum fríggjadagin heitur borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, staðiliga á partarnar í verkfallstrætuni um at fara aftur til samráðingarborðið við tí neyðuga viljanum til at finna eina semju**

VERKFALL
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Í Norðlýsinum fyri fríggjadagin hevur borgarstjórin í Klaksvík skrivað eitt bræv til avvarðandi partarnar av verkfallinum, sum herjar alt landið hesar dagarnar.

Í brævinum heitir hann staðiliga á teir um aftur at setast við samráðingarborðið og finna eina loysn.

### Rakar útjaðaran

Í brævinum sigur Steinbjørn Jacobsen millum annað, at sum borgarstjóri í næststørstu kommunu í landinum, er tað hansara skylda at gera vart við, at Klaksvíkin og Norðoyggjar saman við hinum útjaðaraøkjunum í Føroyum enn einaferð eru í eini vanlukkuligari støðu, orsakað av verkfallinum, sum hevur lagt farleiðina um Leirvíksfjørð lamna.

Hendan leiðin er einasta farleiðin úr Norðoyggjum, og tí eisini ein lívsæðr hjá økinum her norðuri.

Umframt at verkfallið er en dyggur smeitur hjá familjum og ungdómi í Norðoyggjum, so rakar tað eisini vinnulívið sera meint.

Umhvørvisliga er tað eisini ein hóttan, tí ruskið verður heldur ikk tikið, og Steinbjørn sigur, at longu nú kann staðfestast, at verkfallið hevur havt umhvørvisligar avleiðingar við sær.

### Tikin sum gíslar

Steinbjørn Jacobsen sigur víðari, at hendan støðan als ikki er til at liva við.

– Vegna Klaksvíkar Býráð vil eg harðliga mótmæla, at ein ósemja á arbeiðsmarknaðinum enn einaferð tekur okkum í útjaðarinum til gíslar – hetta kann undir ongum umstøðum góðtakast, sigur Steinbjørn við Norðlýsið.

Víðari sigur hann, at ein skipan má og skal finnast, sum tryggjar, at henda gíslatøka av einum minniluta í samfelagnum verður steðgað og ongantíð aftur endurtikin.